# Sørvingar vilja vera uttanfyri

**Sørvingar verða ikki við, tá ið tey í Sandavági og í Miðvági fara til fólkaatkvøðu um at leggja kommunurnar í Vágum saman**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at tað verður ongin fólkaatkvøða í Sørvági um at leggja kommunurnar í Vágum saman.

Tað er greitt eftir bygdaráðsfund í Sørvági í gjárkvøldið, har tað varð einmælt samtykt, at tað skal ongin fólkaatkvøða verða í Sørvági.

Sostatt fara sørvingar ikki at fylgja í fótasporunum hjá Sandavági og Miðvági, sum eru hinar báðar kommunurnar í Vágum, tí í teimum báðum bygdunum verður fólkaatkvøða um at leggja kommunurnar í Vágum saman.

Fólkaatkvøðan í Miðvági og í Sandavági verður samstundis sum løgtingsvalið verður tann 19. januar og í tíðini upp til valið, skal upplýsandi tilfar fáast til vega til borgararnar í báðum bygdunum um fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging, samstundis sum ætlanin er at skipa fyri borgarafundi.

Í Miðvági og í Sandavági halda tey, at tað er ein fyrimunur at hava fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging samstundis sum fólkaatkvøðu, tí tá fer fólk á val kortini og sostatt eru útlit fyri eini rættiliga stórari valluttøku.

## Sørvingar ikki við

Í gjárkvøldið skuldi so Sørvágs Bygdaráð taka støðu til um fólkaatkvøða eisini skuldi vera í Sørvági.

Men har var full semja um, at tað skuldi ongin fólkaatkvøða vera um samanlegging í Sørvági.

Bygdaráðið í Sørvági samtykti hinvegin at bíða eftir løgtingsvalinum fyri at vita, hvørjar ætlanir ein nýggj samgonga hevði við kommununum.

Eitt, sum lá í hesum, er, at Sørvágs Bygdaráð vil vita, hvørjar ætlanir ein nýggj samgonga hevur um at leggja ymisk málsøki undir kommunurnar at umsita og so verður spurningurin tikin uppaftur eftir tað.

Bygdaráðslimir ivaðust eisini í um ein nýggj løgtingssamgonga ikki eisini fór at leggja kommunur saman við lóg, tí hendir tað, er onki endamál hjá kommununum at brúka tíð og kreftir upp á spurningin.

- Ætlar ein nýggj samgongu ikki at leggja fleiri málsøki undir kommunurnar at umsita, er ongin orsøk at skunda sær at taka støðu til kommunusamanlegging, var eitt sjónarmið á bygdaráðsfundinum í Sørvági.

Tað varð eisini hildið at vera skeivt at blanda eina fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging upp í løgtingsvalið, ella sum onkur tók til: Tað er púra skeivt at vevja alt saman.

Bygaráðslimir í Sørvági halda eisini, at tað verður bara eitt eljustríð at tosa um fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging mitt í jólamánaðinum.

– Tað er eisini skeivt at halda atkvøðugreiðslu um kommunusamanlegging samstundis sum løgtingsvalið er við teirri grundgeving at tá verður valluttøkan størri.

Tað, sum lá í tí var, at fólk, sum hava áhuga í málinum um kommunusamanlegging, fara at siga sína hugsan, sama um løgtingsval er ella ikki.

Les eisini síðu 5.



*Gott lag á bygdaráðsfundi í Sørvági í gjárkvøldið. Frá vinstru eru tað Sunrid Rasmussen, skrivari, Sune Jacobsen og Thordis Skaalum, bygdaráðslimir. Bygdaráðslimirnir eru samdir um, at tað er púra skeivt at vevja jól, løgtingsval og fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging, saman*




# Badmintonhøllin letur upp leygardagin 17. november



**Kl 14.00 lata dyrnar upp**

***Á skránni er millum annað:***

- Pentagon spælir
- Jákup Anthoniussen bjóðar vælkomin
- Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum - siga nøkur orð
- Klaksvíkar Hornorkestur, Bólkur frá Virkishúsinum, Country-bólkurin, KFUM-kórið, Kvartettin í Betesda og Vitin syngja og spæla.
- Eisini verður eitt minni borðhald og sjálvandi verður onkur serligur badmintondystur.
- Og møguliga koma TrøllaPætur og TrøllaOmman á vitjan.

**Vælkomin í Badmintonhøllina**
**leygardagin 17. nov. 2007 - kl. 14.00**

**Sunnudagin 18. november - kl. 14.00**
**Verður felagssunnudagsskúli fyri øll børn í Norðoyggjum. Við m.a. bíbliusøgum, spølum, spurnarkappingum og góðum sangi**

Klaksvíkar Badmintonfelag | Garðsendi 8 | 700 Klaksvík | Fartel. 598200 | Fax. 457730

cre8 458006